# Tey skála lítið við Skálafjørðin




- Talið á teimum sum nýta rúsdrekka er minkað, sigur Hjalmar Hansen, aðalskrivari í Bláakrossi

Mynd: blakross.fo

**- Tað er at fegnast um, at talið av teimum, sum nýta rúsdrekka, er minkað í mun til eina kanning, sum var gjørd fyri 16 árum síðan, sigur Hjalmar Hansen, aðalskrivari í Bláa krossi**

RÚSDREKKA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Hjalmar hevur lisið kanningina av rúsdrekkanýtsluni hjá føroyingum, sum Fyribyrgingarráðið og deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu hava gjørt.

Fyri 16 árum síðani søgdu 13 % av monnunum og 28 % av kvinnunum seg als ikki drekka rúsdrekka. Hesi tølini í tí nýggjastu kanningini eru ávikavist 16 % og 31 %.

Men fyri aðalskrivarin í Bláakrossi er tann stóri spurningurin, hví tað er so?!

Kanningin gevur ikki svarið, men lítil ivi man vera um, at arbeiðið við fyribyrging, sum millum annað Bláikrossur stendur fyri, og ein hugburðsbroyting hava havt sína ávirkan

Tøl frá Rúsuni vísa, at nýtslan í litrum av rúsdrekka, var 49,3 litrar í 1993 og kom í hæddina í 2003, tá nýtslan var 62,8 litrar fyri hvønn íbúgva – ein vøkstur uppá 27 %.

At nýtslan í litrum er økt, samstundis, sum talið av teimum, sum ikki drekka rúsdrekka, er vaksið, má merkja, at tey, sum so nýta rúsdrekka, nýta meir av tí – í litrum – enn tey gjørdu frammanundan.

- Størri orsøk hevði ivað verið at fegnast, um tølini fyri nýtslu vóru fallandi!, sigur Hjalmar Hansen.

### Munir á økjum

Í kanningini hevur Hjalmar staðfest, at har postnummarið byrjar við 6, er miðalnýtslan lægst.

- Hetta er áhugavert, sigur hann. Verður hugt eftir, hvar hetta er, síggja vit bygdir sum: Saltangará, Runavík, Glyvrar, Toftir, Rituvík og Søldarfjørður.

- Og frá einum Blákrosssjónarmiði er áhugavert, at tað er júst í hesum økjum, at felagsskapurin hevur flest limir og stendur sterkastur. Hetta kann vera orsøkin til at miðalnýtslan her er lægst, sigur hann.

Hinvegin hevur Vágoyggin tað keðiliga eyðkennið, at miðalnýtslan av rúsdrekka har er hægst.

## Tríggjar litrar um vikuna

Granskingardepilin fyri økismenning gjørdi eina kanning fyri Bláa Kross í 2004 um nýtsluna av m.a. rúsdrekka millum næmingar í 7. og 9. flokkum í Klaksvík, Vágum og Runavík.

Áhugavert var at síggja, at tølini í hesi kanning, vísa sama mynstur. Royndirnar við rúsdrekka vóru munandi størri hjá ungum í Vágum enn millum ung í Runavíkar kommunu.

Svarini í kanningini hjá Fyribyrgingarráðnum vísa, at tey, sum nýta rúsdrekka, drekka 3,0 litrar í miðal um vikuna.

Har postnummarið byrjar við 3, er miðaltalið 3,9 og har tað byrjar við 6, er miðalnýtslan 1,3 litrar í miðal.

---

# Veruligi jólaboðskapurin skal fram

Norska postverkið gav í farnu viku út tvey jólamerki, sum venda sjóneykuni ímóti tí, sum upprunaligi boðskapurin var á jólum: Jólastjørnuni, Jesusbarninum í krubbuni og vísmonnunum.

Tað eina jólamerkið vísir jólastjørnuna á himmalinum, meðan teir tríggir vísmenninir frammanvert krubbuni er myndevnið á hinum merkinum.

- Við dagsins hákonjukturi og handilsligum tosi, ynskja við at seta fokus á høvuðsinnihaldið í jólaboðskapinum, sigur Halvor Fastin, sum er frímerkjastjóri hjá norska postverkinum.

Tað er norska Anne Kristin Hagesæther, sum hevur gjørt merkini.




*Anne Kristin Hagesæther hevur gjørt nýggju norsku jólamerkini*

## Innsavning til nýggja urgu á netinum



**USA:** Eigarin av plátufelagnum JAV Recordings, ið hevur sumsergrein at gera upptøkur við pípu-urgum, hevur tikið alternativar mátar í brúk fyri at bjarga eini gamlari kirkju-urgu, skrivar New York Times. Í eini fátækari sókn í Brooklyn, New York er urgan í kirkjuni so niðurslitin, at hon møguliga mátveitast burtur. Trupulleikin er bert tann, at sóknin hevur ikki ráð at gera hana í stand aftur. Tann virkni eigarin av plátufelagnum, Joe Vitacco hevur tí lagt tvey stutt video-klipp við eini bøn um fíggjarligan stuðul á YouTube.com, sum er ein heimasíða har ein kann leggja sínar egnu video-upptøkur út. Tiltakið bar ávøkstur beinanvegin: Fleiri enn 5000 vitjanir hava sæð upptøkurnar og fleiri túsund krónur eru longu komnar frá fólki í USA og Europa.

## Fyrireika ferming á netinum

**Noreg:** Fjarstøða er eingin forðing fyri at verða fermdur í Noregi. Undirvísingin kann nú gerast umvegis alnetið. – Hetta er eitt ótrúligt tilboð til norskan ungdóm í útlandinum, sigur Espen Ingebrigtsen, sum hevur ábyrgd av net-konfirmantunum, sambært heimasíðuni hjá norsku sjómanskirkjuni. Tað er líkamikið, hvar konfirmantarnir eru, og higartil hava 28 norskir ungdómar meldað seg til skipanina. Meðan konfirmantarnir ganga til, verða allar uppgávurnar sendar umvegis teldupost og konfirmantarnir kunnu tjatta við hvønn annan á alnetinum. Hugskotið vendir sær til konfirmantar, sum búgva so mikið langt burtur frá eini sjómanskirkju, at teir ikki kunnu luttaka í eini vanligari fyrireiking til fermingina. Íalt eru 12 leksjónir í undirvísingini. Sjálv fermingin fer annaðhvørt fram í heimakirkjuni í Noregi, við eina av sjómanskirkjunum ella við ambulantum gudstænastustøðum.